Einasta blaðið
**5** ferðir um vikuna

tíðindablaðið
# sosialurin
Telefon 11820 Telefax 14720

Sosialin finnur tú á Internet:
http://WWW.cybernet.dk/faroe-news
e-mail: sosialur@olivant.fo

## veðrið

Hátrýst yvir leiðunum undan Eysturgrønlandi til Norðurskandinaviu stendur nærum í stað og viknar. Lágtrýst við avfalli yvir bretsku oyggjunum er somuleiðis støðugt. Nyggja lágtrýstið og tilhoyrandi brúgvalag, ið nærkast Føroyum av útsynningi, elva móti endanum av tíðarskeiðnum til avfall á okkara leiðum.

### Týsdagin



Millum gul og stívt andøvsgul, 5–10 m/s, av landsynningi, aðrigið, at byrja við æðingur og kanska mjørkaflókar og bert tóluligt sýni. Út á seinnapartin minkandi vindur og betri sýni. Hitin millum 6 og 9 stig.

### Mikudagin

At byrja við uml. gul, 5 m/s, út á dagin friskandi til stívt andøvsgul, 10 m/s, lutvíst aðrigið, men mestsum turt, gott sýni og sólarglott-ar. Hitin um dagin upp í 10 stig, um náttina niður í 5 stig.

### Hósdagin

Friskandi til millum andøvsgul og struk í vindi, 8– 13 m/s, av eystri og landsynningi, aðrigið, men turt, gott sýni og kanska sólarglottar. Hitin um dagin upp í 10 stig, um náttina niður í 5 stig.

### Fríggjadagin & leygardagin

Millum gul og stívt andøvsgul, 5–10 m/s, av eystri, aðrigið, regn og bert tóluligt sýni. Minkandi vindur út á leygardagin. Hitin millum 6 og 9 stig.

## óli teknar




**Tingmenn sambandsflokksins siga seg ikki fáa samband við løgmann, ið einsamallur gjørdi av, um hann ikki fekk sín vilja, at útskriva val at verða mikudagin 26. juni, dagin fyri sjeyssovaradagin**

**Vit umvæla sjónvørp, radio, video v.m.**

Góðkent tænastu-umboð hjá Sony, B&O, Sanyo, Orion, Sharp, Finlux, Jamo, Sansui og fleiri

**DELTA △**
**Elektroniktænastan**
M.a. Winthersgøta 1
Box 3170 · 110 Tórshavn
Tlf. 18050 · Fax tlf. 86050
Opið mán.-frí. 8-16

## Fleiri árar á politistøðini

Seinnapartin fríggjadagin vóru nakrir unglingar farnir út við einum báti, tey høvdu tikið.

Politiið fekk tey at koma at landi, og í bátinum vóru fleiri árar, sum ikki hoyrdu til bátin.

Suni Vinther, leiðari á politistøðini í Havn, sigur, at politistøðin hevur á goymslu hópin av árum, sum eru funnar. Tær hoyra til bátar á Skálatrøð. Skuldi onkur saknað árar í báti sínum, kunnu tey altíð spyrja seg fyri á politistøðini.

## Studningar til framhaldsútbúgvingar innan oljuvinnu

**Atlantic Margin Group** (t.e. Mobil, Enterprise Oil og Statoil) hevur avgjørt at láta 4 studningar (scholarships) til føroyingar, ið vilja taka eina framhaldsútbúgving/sérfrøðingaútbúgving í hesum greinum innan oljuvinnu: jarðfrøði, jarðalisfrøði, oljuverkfrøði og búskapi.



Sum útbúgvingarstøð hevur **Atlantic Margin Group** valt hesi universitet í Bretlandi: Heriot-Watt University, Edinburgh, University of Dundee ella Royal School of Mines, London. Generelt er talan um eitt árs framhaldsútbúgving.

Umsøkjarar skulu allar helst hava eina relevanta kandidatútbúgving, ella ið hvussu er vera komnir upp á Bachelor stig í útbúgving síni. Dømi um upptøkukrav frá Centre for Petroleum and Mineral Law and Policy, Universitet of Dundee, til MSc (Master of Science) in Energy Studies: »Applications are invited from graduate students and working professionals from a variety of degree backgrounds, although a degree in economics, geology, petroleum or mineral engineering or other suitable subject is desirable«.

Studningarnir eru ætlaðir at rokka til bæði undirvísingargjøld og vist.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Halvor Snarvold, Enterprise Oil, London, tlf. (0044 171 925 4000) ella Setursskrivstovuna, Handan A.S, Tórshavn, tlf. (+298) 15302, har eisini umsóknarbløð eru til skjals. Umsóknarfreistin er *20. juni 1996*.

FLOGFRAKT * SJÓFRAKT
**SAFARI TRANSPORT**
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 1 2222

## Vestfalskyrrindi

17. mai: Tendring
22. mai: Manin longst frá jørðini
25. mai: Fyrra kvarter

| Dato | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði fp. | Haraldssundi/Leirvíksfirði sp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp. | Skúvoyarfirði/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. mai | 1032 | 2255 | 0009 | 1232 | 0847 | 2110 | 1047 | 2310 | 0932 | 2155 | 0947 | 2210 |
| 22. mai | 1117 | [illegible] | 0055 | 1317 | 0932 | 2154 | [illegible] | 2354 | 1017 | 2239 | 1032 | 2254 |